# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um skatta- og avgjaldsmál

| Mál nr. :<br>23/16238 | Lóg:<br>Meirvirðisgjaldslógin<br>§§ 1, 2 og 12 | Avgerð tikin:<br>11. juni 2024 |
|---|---|---|

**Meirvirðisgjald av gullmyntum**


**Samandráttur:**
**Kært er um, at TAKS hevur tikið avgerð um at áleggja meirvirðisgjald á gullmyntir, sum kærari hevur keypt, og sum eru innfluttar til Føroyar.**

**Samanumtikið metir Føroya Kærustovnur, at undantakið í § 12, stk. 1, litra q, (pengaseðlar og myntir) í meirvirðisgjaldslógini, skal tulkast avmarkandi, men at tað ikki kann setast sum treyt, at hesi kunnu nýtast ella hava kunnað verið nýtt sum loyvdur gjaldsmiðil, tá ið hendan treyt tilvitað er tikin úr lógaruppskotinum til ásetingina. Ásetingin skal ikki tulkast so breitt, at allar myntir eru fevndar av undantakinum. Av tí at umrøddu myntir, soleiðis sum málið er upplýst, eru útgivnar av einum tjóðarbanka, metir Føroya Kærustovnur, at tað er haldgóð grund til at staðfesta, at myntirnar eru fevndar av undantakinum í § 12, stk. 1, litra q, í meirvirðisgjaldslógini.**

**Føroya Kærustovnur hevur avgjørt at broyta avgerðina hjá TAKS, soleiðis at meirvirðisgjald ikki skal leggjast á myntirnar, sum kærarin hevur innflutt.**


**TAKS**

TAKS hevur 24.07.2023 tikið avgerð um, at myntirnar, sum kærarin innflutti til Føroyar 26.05.2023, vóru avgjaldsskyldugar við innflytingina.

Í ummæli, dagf.12.09.2023, frá TAKS stendur soleiðis:

> “***Ummæli av kæru***
>
> *Viðvíkjandi kæru um avgerð hjá TAKS, dagfest 24. juli 2023, um MVG á innfluttar myntir.*
>
> *Føroya Kærustovnur hevur biðið TAKS um eitt ummæli av kæruni. Føroyar Kærustovnur hevur eisini biðið um tey skjøl, sum hava verið grundarlagið undir innkærdu avgerðini.*
>
> *Avgjald á vørur, sum vera innfluttar úr útlondum, er ásett í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 61 frá 22. mai 2023 (meirvirðisgjaldslógin).*

*Sambært § 1 í meirvirðisgjaldslógini skal avgjald rindast til landskassan við innflutning úr útlondum. Sambært § 2 er avgjaldsskyldan galdandi fyri nýggjar og brúktar vørur.*

*Sambært § 27 í meirvirðisgjaldslógini eru vørur, ið verða innfluttar úr útlondum, avgjaldsskyldugar í sambandi við innflutningi. Sambært § 27, stk. 11 kunnu vørur innflytast avgjaldsfrítt, um so er, at samsvarandi latingar her í landinum av tílíkum vørum framdar av avgjaldsskyldugum virkjum høvdu verið frítiknar fyri avgjaldi.*

*Sambært § 12, litra q) í lógini fevnir avgjaldsskyldug søla ikki um pengaseðlar og myntir.*

*Ásetingin um frítøku av pengaseðlum og myntum kom inn í meirvirðisgjaldslógina við løgtingslóg nr. 62 frá 30. apríl 2018 um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. Samstundis blivu eisini frímerkir undantikin meirvirðisgjaldi.*

*Í viðmerkingunum til lógina stendur, at endamálið við uppskotinum er, at pengaseðlar, myntir og frímerkir verða undantiknar meirvirðisgjaldi, og at hetta verður gjørt fyri í størri mun at javnseta mynt- og frímerkjasavnarar í Føroyum við mynt- og frímerkjasavnarar uttanfyri Føroyar. Í viðmerkingunum til lógina stendur ikki, hvørjar myntir eru fevndar av ásetingini.*

*Tá tað ikki verður nágreina í ásetingini, hvørjar myntir eru fevndar, hevur TAKS kannað, hvussu lóggáva á økinum er skipað uttanfyri Føroyar, tá tað í viðmerkingunum stendur, at myntsavnarar skulu javnsetast við myntsavnarar uttanfyri Føroyar. TAKS hevur í hesum sambandi kannað lóggávuna í Norra, Danmark og Íslandi.*

*Samanumtikið kann staðfestast, at tað bara er í Norra, at myntir, sum áður hava verið nýttar sum loyvdur gjaldsmiðil, kunnu innflytast avgjaldsfrítt. Í Danmark og í Íslandi verður avgjald lagt á gamlar myntir, sum áður hava verið nýttar sum loyvdur gjaldsmiðil.*

*Í Norra, Danmark og Íslandi verður avgjald lagt á myntir, sum ikki hava verið nýttar sum loyvdur gjaldsmiðil.*

***Meting av § 12, litra q) í meirvirðisgjaldslógini***

*Í viðmerkingunum til § 12, litra q) í meirvirðisgjaldslógini stendur at myntsavnarar í Føroyum skulu javnsetast við myntsavnarar uttanlands. TAKS hevur tí tulka § 12, litra q) við støði í lóggávuni í londunum rundan um Føroyar. TAKS metir tískil, at ásetingin í § 12, litra q) um "myntir" skal tulkast á tann hátt, at mynt, sum kann nýtast sum loyvdur gjaldsmiðil, og mynt, sum áður hevur verið nýtt sum loyvdur gjaldsmiðil, er undantikin meirvirðisgjaldi.*

*TAKS metir ikki at aðrar myntir, t.d. gullmyntir, silvurmyntir og minnismintir, sum ikki hava verið nýttar sum loyvdur gjaldsmiðil, kunnu koma undir "myntir" í § 12, litra q) í meirvirðisgjaldslógini.*

*Tulkingin hjá TAKS vil javnseta myntsavnarar í Føroyum við myntsavnarar í Norra. Tulking vil geva myntsavnarum í Føroyum betri rættindi enn myntsavnarar í Danmark og Íslandi.*

*Vísast kann eisini á, at samstundis sum myntir blivu undantiknar meirvirðisgjaldi, so blivu eisini pengaseðlar og frímerkir undantikin meirvirðisgjaldi. TAKS tulkar pengaseðlar á tann hátt, at talan skal verða um pengaseðil, sum kann ella hevur verið nýttur sum loyvdur gjaldsmiðil. Á sama hátt tulkar TAKS frímerkir, sum frímerkir sum kunnu nýtast á einum brævbjálva. TAKS metir, at tað er í tráð við hesa tulking, at "myntir" í § 12, litra q) verða tulkaðar, sum myntir sum kunnu ella hava verið brúktar sum loyvdur gjaldsmiðil.*

**Kærarin**

Í telduposti, dagfestum 15.08.2023, hevur kærari skrivað soleiðis:

"*Avgerðin hjá TAKS verður hervið kærd til Føroya Kærustovn.*

*Í teirra avgerð vísir TAKS vísir á, at frítøkurnar í § 29, stk. 11 (skal nokk verða § 27, stk. 11) og § 12q í mvg-lógini ikki eru galdandi í hesum føri, av tí at myntirnar ikki kunnu nýtast sum loyvdur gjaldsmiðil.*

*Ásetingin í § 12q í mvg-lógini er annars soljóðandi:*

*"Avgjaldsskyldug søla fevnir ikki um:*

..................

*q. Pengaseðlar og myntir."*

*Lógarteksturin nevnir einki um, at myntir skulu kunna nýtast sum loyvdur gjaldsmiðil fyri at koma undir frítøkuna.*

*Ásetingin í § 12q í mvg-lógini er innsett við løgtingslóg nr. 62 frá 30.04.2018 Í viðmerkingunum til lógaruppskotið (LM-116/2017) stendur, at:*

*"Mælt verður til, at pengaseðlar, myntir og frímerkir verða undantikin fyri meirvirðisgjald. Hetta verður gjørt fyri í størri mun at javnseta mynt-og frímerkjasavnarar í Føroyum við mynt- og frímerkjasavnarar uttanfyri Føroyar."*

*Heldur ikki viðmerkingarnar til lógaruppskotið siga nakað um, at myntir skulu kunna nýtast sum loyvdur gjaldsmiðil.*

*Hinvegin framgongur av lógaruppskotinum, at:*

> *"Føroya Filatelistfelag og Føroya Myntsavnarafelag hava munnliga víst á, at orðingin í § 1, nr. 3 í uppruna uppskotinum ikki hevði verið nøktandi fyri feløgini, og verður tí mælt til at víðkað orðingina. Fíggjarmálaráðið hevur tikið viðmerkingarnar til eftirtektar og hevur nágreinað ásetingina samsvarandi hoyringssvarinum."*

*Áðrenn lógaruppskotið var lagt fram, var upprunauppskotið lagt út til almmena hoyring á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum. Tað framgongur í hesum sambandi, at upprunauppskotið innihelt fylgjandi lógartekst til § 12q í mvg-lógini:*

> *"Avgjaldsskyldug søla fevnir ikki um:*
>
> .................
>
> *q. pengaseðlar (vørunummar 4907.00.30) og myntir (vørunummar 7118.10.00), sum kunnu nýtast sum gjaldoyra. r. Frímerkir (vørunummar 9704.00.00)."*

*Sostatt var upprunaliga ætlanin at avmarka frítøkuna til myntir, sum kunnu nýtast sum gjaldoyra. Eftir áheitan frá Føroya Myntsavnarafelag varð orðingin í endaliga uppskotinum tó víðkað til at fevna um allar myntir.*

*Grundgevingin hjá TAKS um, at myntir skulu kunna nýtast sum loyvdur gjaldsmiðil er tí bert ein leivd frá einum eldri uppskoti, sum ongantíð varð lagt fram. Tað er eyðsæð út frá bæði lógarteksti í § 12q í mvg-lógini og løgtingsmáli nr. 116/2017, at frítøkan fevnir um allar myntir, herundir eisini savnaramyntir, sum ikki kunnu nýtast sum loyvdur gjaldsmiðil.*

...

**Lógargrundarlag**

Løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1994, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 61 frá 22. mai 2023.

**Avgerðin hjá Føroya Kærustovni**

Útgangsstøðið sambært § 1, stk. 1, í meirvirðisgjaldslógini, er, at avgjald skal rindast til landskassan í øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutning úr útlondum. Sambært § 2, stk. 1, í meirvirðisgjaldslógini, er avgjaldsskyldan galdandi fyri allar nýggjar og brúktar vørur.

Í hesum málinum er talan um innflutning av vørum. Sambært § 27, stk. 1, í meirvirðisgjaldslógini, eru vørur, ið verða innfluttar úr útlondum, avgjaldsskyldugar í sambandi við innflutningin. Í hesum málinum hevur TAKS tikið avgerð um, at myntirnar, sum

kærari innflutti í juni 2023, eru avgjaldsskyldugar. Hetta hevur kærari kært, vísandi til undantakið í § 27, stk. 11, í meirvirðisgjaldslógini, sum ásetur, at vørur kunnu verða innfluttar avgjaldsfrítt, um so er, at samsvarandi latingar her í landinum av tílíkum vørum framdar av avgjaldsskyldugum virkjum høvdu verið frítiknar fyri avgjald, og at sambært § 12, stk. 1, litra q, í meirvirðisgjaldslógini, fevnir avgjaldsskyldug søla ikki um pengaseðlar og myntir.

Sambært upplýsingunum í málinum er talan í høvuðsheitum um gullmyntir, sum eru útgivnar av einum tjóðarbanka, men sum ikki hava verið nýttar sum lógligir gjaldsmiðlar. Talan er heldur um samlaramyntir. TAKS metir ikki, at samlaramyntir, sum ikki verða ella hava verið nýttar sum lógligir gjaldsmiðlar, eru fevndar av hugtakinum, myntir, í meirvirðisgjaldslógini. Á sama hátt tulkar TAKS pengaseðlar á tann hátt, at talan skal vera um pengaseðil, sum kann nýtast ella hevur verið nýttur sum loyvdur gjaldsmiðil, og frímerkir sum frímerkir, sum kunnu nýtast á einum brævbjálva. Hinvegin vísir kærari á, at tað er einki í lógarteksti ella viðmerkingum til lógaruppskotið, sum gevur ábendingar um, at tað skal vera treyt fyri avgjaldsfrítøkuni, at talan skal vera um myntir, sum kunnu nýtast ella hava kunnað verið nýttar sum lógligur gjaldsmiðil. Tvørturímóti varð hendan treytin tikin úr lógaruppskotinum, áðrenn tað varð lagt fram í Løgtinginum. Sambært kærara kann hetta bara merkja, at orðingin bleiv víðkað til at umfata allar myntir.

Útgangsstøðið í meirvirðisgjaldslógini er sum nevnt, at avgjald skal rindast av øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutning úr útlondum. § 12, stk. 1, í meirvirðisgjaldslógini, ásetur undantøkini, sum avgjaldsskyldug søla ikki fevnir um. Har í millum er litra q, sum ásetur, at pengaseðlar og myntir eru undantikin avgjaldsskyldu. Av tí, at talan er um eitt undantak, talar hetta fyri eini avmarkandi tulking, og Føroya Kærustovnur metir ikki, at ásetingin kann tulkast soleiðis, at allar myntir av einumhvørjum materiali, óansæð hvør framleiðarin er, kunnu vera fevndar av ásetingini. Ásannast má, at eginleikin hjá eini mynt sum gjaldsmiðil er væl egnað sum eyðkenni fyri at staðfesta, um talan er um eina mynt, sum er fevnd av eini ávísari lóg ella ei. Ávísur týdningur má tó leggjast í, at treytin, um at pengaseðlar og myntir skuldu kunna nýtast sum gjaldoyra fyri at vera undantikin avgjaldsskyldu, varð strikað, og at Løgtingið í viðmerkingunum í lógaruppskotinum er kunnað um, hví treytin varð tikin úr lógaruppskotinum. Orsøkin var, at uppruna orðingin ikki var nøktandi fyri Føroya Filatelistfelag og Føroya Myntsavnarafelag. Hetta er ikki gjølligari útgreinað í lógaruppskotinum, men helst hava aðrar myntir, sum ikki kunnu nýtast sum gjaldoyra, samlaravirði, og tí hevur verið ynski um, at eisini tær myntirnar skuldu vera undantiknar avgjaldsskyldu.

TAKS hevur tulkað ásetingina sum, at myntirnar antin skulu kunna nýtast ella hava verið nýttar sum lógligur gjaldsmiðil fyri at vera fevndar av undantakinum. Í kæruummælinum vísir TAKS á, at í serligu viðmerkingini til § 12, stk. 1, litra q, í meirvirðisgjaldslógini, stendur, at orsøkin til broytingina er fyri í størri mun at javnseta mynt- og frímerkjasavnarar í Føroyum við mynt- og frímerkjasavnarar uttanfyri Føroyar. TAKS lýsir síðan rættarstøðuna á økinum í Norra, Danmark og Íslandi. Føroya Kærustovnur skal tó vísa á, at rættarstøðan í hesum londum ikki kann vera avgerandi fyri, hvussu rættarstøðan skal vera í Føroyum, tí rættarstøðan *uttanfyri Føroyar* er eitt sera óítøkiligt og broytiligt hugtak.

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um skatta- og avgjaldsmál

Metast má, at tjóðarbankar o.l. bankar hava einkarætt at útgeva pengaseðlar og myntir, sum kunnu nýtast sum gjaldmiðil. Hóast talan í hesum førinum er um myntir, sum ikki kunnu nýtast sum gjaldmiðil, er talan um myntir, sum sambært upplýsingunum í málinum eru útgivnar av einum tjóðarbanka (sambært kærara kann tann eina myntin í prinsippinum nýtast at keypa við í dag). Føroya Kærustovnur metir, at hetta hevur stóran týdning fyri metingina av, um myntirnar eru fevndar av undantakinum í § 12, stk. 1, litra q.

Samanumtikið metir Føroya Kærustovnur, at undantakið, pengaseðlar og myntir, í § 12, stk. 1, litra q, í meirvirðisgjaldslógini, skal tulkast avmarkandi, men at tað ikki kann setast sum treyt, at hesi kunnu nýtast ella hava kunnað verið nýtt sum loyvdur gjaldsmiðil, tá ið hendan treyt tilvitað er tikin úr lógaruppskotinum til ásetingina. Ásetingin skal ikki tulkast so breitt, at allar myntir eru fevndar av undantakinum. Av tí at umrøddu myntir, soleiðis sum málið er upplýst, eru útgivnar av einum tjóðarbanka, metir Føroya Kærustovnur, at tað er haldgóð grund til at staðfesta, at myntirnar eru fevndar av undantakinum í § 12, stk. 1, litra q, í meirvirðisgjaldslógini.

**Vísandi til omanfyristandandi hevur Føroya Kærustovnur avgjørt at broyta avgerðina hjá TAKS, soleiðis at meirvirðisgjald ikki skal leggjast á myntirnar, sum kærarin flutti inn tann 26.05.2023.**